Dagf. 19. november 2024
HMR j. nr. 24/25814-2

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-052/2024 eftir § 52a í tingskipanini viðvíkjandi afturrindan av heilsutrygdargjaldi til útisiglarar, frá Jóhan Dahl, løgtingsmanni.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvat er status við arbeiðinum at broyta lógina um heilsutrygd í sambandi við afturrindan av heilsutrygdargjaldi til útisiglarar?
2. Nær kann væntast nágreiniliga tíðspunktið, at lógaruppskot verður lagt fyri tingið?

Svar:

Til spurning 1

Lógaruppskotið um afturindan av heilsutrygdargjaldi er sent viðkomandi hoyringspørtum til hoyringar. Uppskotið sæst eisini á ummælisportalinum.

Freistin at gera viðmerkingar til uppskotið er 12. desember 2024.

Til spurning 2

Tá hoyringarfreistin er úti, verða hoyringarsvarini viðgjørd í Heilsumálaráðnum. Miðað verður ímóti at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í januar 2025.

Heilsumálaráðið, 19. november 2024

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna